## Bayern München-savn

Týska stórfelagið, Bayern München, hevur ætlanir um at gera eitt serligt interaktivt savn, sum skal lýsa stórslignu søgu felagsins. Bygningurin skal standa klárur um eitt ár, og bilframleiðarin, Audi, er partnari í verkætlanini, ið kemur at húsast við síðuna av Allianz Arena. Felagið eigur týska metið í bæði meistaraheitum og steypasigrum.




## FIFA friðar bóltin

Eisini í framtíðini verða tað dómararnir, ið eftir bestu sannføring skulu gera av, um bólturin er farin um málstrikuna ella ikki í einum fótbóltsdysti. Tað er greitt, eftir at lógarnevndin hjá FIFA hevur vrakað eitt uppskot um at brúka bóltar við innbygdum telduchippi og einum málupptøkutóli. Hesin teknikkurin er eitt nú kendur frá íshockey.

### Fleyr-SÍ 2-3 (25-21, 25-21, 17-25, 18-25, 11-15):

# SÍ blokkaði Fleyr út

Hóast Fleyr endaði hetta kappingarárið á bronsuplássinum fyri nøkrum vikum síðani, tá tað gjørdist greitt, at finalukjansurin ikki longur var til staðar, megnar havnarliðið framvegis at geva teimum ovaru liðunum dygga mótstøðu. Ikki minst í gjár, tá Fleyr kom á odda 2-0 í settum ímóti SÍ, áðrenn dysturin spakuliga vendi hinvegin.

Spælið hjá Fleyr var gott og varierað tey bæði fyrstu settini, tá hinvegin einki vildi bera til hjá SÍ. Serliga í álopsspælinum formáddu sørvingar sær lítið, og teir vóru í grundini á veg ímóti at tapa dystin, tá spælandi venjarin, Ragnar í Haraldsstovu, valdi sjálvur at koma inn.

Hann munaði beinanvegin væl frammi við netið, har hann blokkaði av lívsins kreftum – gjarna saman við Inga Ole-Jacobsen. Men fyrst var tað Jón Joensen, ið fekk givið álopinum slagkraft, tá hann mestsum beinanvegin í triðja setti rakti formin og gekk undan.

Líka so sannførandi, sum Fleyr hevði vunnið tey bæði fyrru settini, vann SÍ triðja og fjórða sett, og skuldi alt avgerast í fimta settinum. Her hevði SÍ eisini munin og vann, so enn er spenningur um, hvør av FM-finalistunum, Mjølnir ella SÍ, endar landskappinga ovast.

**hil**




**Fleyr vann tey bæði fyrstu settini og var á veg ímóti sigri, tá SÍ fór at satsa upp á blokkin og fekk tvingað dystin út í fimm sett – og vunnið hann**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Dráttur-SÍ 2-3 (25-21, 21-15, 16-25, 15-25, 13-15):

# Finaluendurtøka

Talan var um eina endurtøku av steypafinaluni, tá kvinnurnar hjá Drátti og SÍ hittust á Giljanesi í gjár. Úrslitið gjørdist eisini tað sama, 3-2 til SÍ, men hesa ferð var Dráttur á odda 2-0, áðrenn SÍ fekk vent dystinum tey bæði næstu settini – og síðani vunnið fimta settið og dystin.

Karin Mikkelsen var ikki við hjá SÍ, og tað var kanska ein viðvirkandi orsøk til, at tað ikki bar so væl til tey bæði fyrstu settini, tí liðið mátti umskipast tilsvarandi. Men einki bilti spælinum og stríðsviljanum hjá Drátti, ið veruliga vísti, at liðið ætlaði sær at taka síðsta sigurin í slagnum um Vágar.

Tað koyrdi eisini væl hjá heimaliðnum. Ikki minst í øðrum setti, har Maja Filipovic legði fyri við at serva Drátt framum 9-0, áðrenn SÍ vann fyrsta stigið. Tá var settið longu avgjørt og Dráttur á odda 2-0.

Men so gjørdi SÍ nakrar broytingar í uppstillingini, ið hjálptu væl til. Talan var enn tá um sera gott spæl í bæði triðja og fjórða setti, har SÍ greitt hevði munin – ikki minst á gólvinum, har farið var eftir øllum, sum bara rørdi seg – hóast Dráttur av øllum alvi royndi at fylgja við.

Í fjórða setti vildi Vivian Joensen vísa, at hon eisini dugdi at serva, tá hon í einum høggi servaði ikki færri enn 14 stig á kontuna hjá SÍ, sum vann settið greitt.

Dysturin var tó ikki liðugur enn, hóast tað sá út til, at SÍ hevði vunnið sær sálarligu yvirvágina undan fimta setti. Tvørturímóti legði Dráttur væl út og var á odda bæði 6-1 og 12-9, men kortini ikki kláraði tað. Støðan var enntá 13-12 til Drátt, tá SÍ gjørdi seinasta vørrin í dystin og tók tríggjar teir seinastu bóltarnar, so sigurin fór til Sørvágs.

**hil**




### KÍF-ÍF 0-3 (24-26, 14-25, 20-25):

# ÍF vann botndystin

Tá KÍF í gjár tók ímóti ÍF, var tað við rættiliga stórari vissu seinasti møguleikin hjá teimum ungu KÍF-kvinnunum at fáa nakað stig hetta kappingarárið. KÍF er aftast og ÍF næstaftast, og fyrr í vetur hevur KÍF so vunnið okkurt sett frá kvinnunum úr ÍF.

At byrja við sá tað eisini lovandi út, tí KÍF fór avstað og sá út til kanska at taka fyrsta settið. Men tað helt bara ikki allan vegin, og í evstu løtu streyk ÍF avstað við settinum. Í øðrum setti var stórur munur á, og somuleiðis vann ÍF triðja sett trygt, so talan gjørdist um ein – hóast alt – greiðan ÍF-sigur í Kollafirði.

**hil**